


## Mentamálaráðið sóknast eftir KT-ráðgeva til nýtt og spennandi starv í KT-deplinum

**Starvið**
Mentamálaráðið sóknast eftir KT-ráðgeva til nýtt og spennandi starv í KT-deplinum. Starvið verður at seta sum skjótast.

**Høvuðsuppgávurnar eru:**
- at veita brúkaratænastu í sambandi við VITANET (nýtt skúlafyrisitingarforrit)
- at kanna kt-nýtslu í undirvísing
- at menna kt-nýtslu í skúlum
- at skipa fyri skeiðum
- at menna talgildar undirvísingargongdir

Fyrsta árið fer størsti partur av tíðini at virka sum verkætlanarsamskipari í sambandi við at seta í verk VITANET.

**Førleikakrøv**
Vit vænta okkum m.a., at umsøkjarar:
- hava útbúgving frá lærdum háskúla ella aðra viðkomandi útbúgving
- hava royndir í undirvísing
- kunnu arbeiða sjálvstøðugt og hava góð samtarvsevni
- eru tænastusinnaðir og fyrikomandi
- hava áhuga fyri avbjóðingum og vilja til at royna nýggjar leiðir.

**Vit bjóða**
Í KT-deplinum eru fleiri spennandi avbjóðingar, sum KT-ráðgevin kemur at fáa ávirkan á. Starvið er áhugavert, fjølbroytt og sjálvstøðugt við skiftandi uppgávum og við nógvum samskifti. Arbeiðið er á einum høgum fakligum stigi, og møguleikarnir fyri bæði persónligari og fakligari menning eru góðir.

**Setanar- og lønartreytir**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og viðkomandi yrkisfelag.

**Umsókn**
Umsókn við prógvum, c.v. o.ø. skulu sendast til:

**Mentamálaráðið**
**Hoyvíksvegi 72**
**Postrúm 3279**
**110 Tórshavn**
ella e-post: **mmr@mmr.fo**

Umsóknin skal verða okkum í hendi í seinasta lagi mánadagin tann 14. juli 2008, klokkan 16.00.

Um tú ynskir fleiri upplýsingar, ber til at ringja til Regin Ellingsgaard, leiðara í KT-deplinum, telefon 321220 ella 555015. Regin hevur e-postin reginel@skulin.fo

**Mentamálaráðið** hevur sum høvuðsuppgávu at fyrisita undirvísingarmál, mentamál og gransking. Harumframt hevur ráðið uppgávur, ið viðvíkja kirkju, loftmiðlum, ítrótti og øðrum frítíðarvirksemi.
**KT-depilin** er staðsettur í Mentamálaráðnum og veitir sjálvstøðuga KT-tænastu í skúlaverkinum. KT-depilin er ráðgevandi hjá skúlaverkinum viðvíkjandi kunningartøkni og skipar fyri at eftirútbúgva lærarar í kunningartøkni. KT-depilin rekur samskiftisskipan skúlaverksins, sum nú hevur 15.300 brúkarar. Eisini veitir KT-depilin skúlum pláss til heimasíður teirra.

Mentamálaráðið
KT-DEPILIN